Tí›indaskriv

Jólabússur Frelsunarhersins

Jólabússurnar hjá Frelsunarherinum eru nú settar í handlarnar. Tann, sum leggur pening í hesar bússur, er vi› til at hjálpa Frelsunarherinum vi› sínum vælger›ar arbei›i.

Meginparturin av tí, i› inn kemur, fer til Herberg Frelsunarhersins í Niels Winthersgøtu 3. Hetta er eitt tilbo› um mat, song og persónliga røkt.

Higartil í ár hava veri› slakar 1700 yvirnáttingar. Umframt hesi hava yvir 300 onnur veri› og vitja, onkur fyri at fáa eina máltí›, ella persónliga røkt, me›an onnur hava havt fyri ney›ini at samtala um persónlig vi›urskifti.

Frá 1. des. 2000 ver›ur arbei›i ví›ka vi› einum dagtilbo›i fyri heimleys.

Allar matútrei›slur ver›a goldnar av tí penningi sum kemur úr jólabússunum og gávum.

Vit eru takksom fyri ta hjálp, sum ver›u givin vi› at stu›la arbei›i Frelsunarhersins.

Gávur kunnu flytast á konto 6460.1516738 ella 6460.1575963 í Føroya Banka.

Tí›indaskriv

Landsfelag Sløkkili›smanna havt a›alfund

Tilbúgving

Eftir a›alfundin fyrr í mána›inum hevur n‡ggja nevndin hjá Landsfelag Sløkkili›smanna nú skipa› seg.

Landsfelag Sløkkili›smanna er áhugafelag hjá sløkkili›smonnum um alt landi› og var› stovna› í 1992.

N‡ggja nevndin hevur sett sær sum mál at samansjó›a sløkkili›sfólk um alt landi›, og a›almáli› er at bøta um korini, sløkkili›sfólk arbei›a undir.

Nú landsins myndugleikar arbei›a vi› eini tilbúgvingarætlan, eru limir felagsins ein avgerandi partur í hesi ætlan. Felagi› tekur ta› sum givi›, at myndugleikarnir fara at taka felagi› meira vi› í fyrireikingarnar, nú tí›in av álvara fer at styttast til oljuvirksemi› fer at byrja.

Uttan sløkkili› og bjargingarfeløg, ver›ur ikki lætt at fáa eina tilbúgving at eydnast til fulnar.

Nevndin í felagnum hevur skipa› seg vi›: Sørin S. Djurhuus, Nor›ragøtu, sum formanni, Runavík sum næstforma›anni, Walther Thomassen, Streymnesi sum kassameistara. Hinir nevndarlimirnir eru: Helgi Olsen, Rituvík, Ludvík Cristiansen, Kvívík. Tiltakslimir eru: Rúni Persson, Tórshavn. Heri Johannesen, Glyvrar.

VI‹MERKINGAR

Hevur Jákup Sverri Kass snorksovi› hesa tingsetuna

Áki Andreasen

Ta› er rættiliga margháttligt at lesa grein hjá Jákup Sverra Kass, løgtingsmanni Sjálvst‡risfloksins.

Fyri ta› fyrsta skuldi ein ikki trú›, at ma›urin hev›i veri› partur av sitandi samgongu hesi seinastu árini. Lat meg siga beinanvegin at vit eru fleiri sum taka stø›u frá atbur›inum hjá Torbjørn Jacobsen, í óhepna úttalilsinum um løgmann.

Fyri ta› næsta so skal Jákup Sverri Kass minnast, til at ta› var Sjálvst‡risflokkurin, sum frá fyrsta degi setti sum eina ófrávíkiliga treyt, at halda fólkaatkvø›ur tí›liga og seint og hevur gjørt ta› sí›an; so ta› er ein heldur ivasamur frambur›ur tá tú skrivar: »Lati› okkum yvirtaka eftir førimuni, og tann dagur kemur, har vit hava yvirtiki› og gjalda fyri øll málsøki› sjálvir. Lati› okkum tá taka eina fólkaatkvø›u…«, eg haldi at ta› hev›i veri› eitt gott hugskot at tingmanningin hjá Sjálvst‡risflokkinum, tosa›i saman, tí semja er um í samgonguni at ein fólkaatkvø›a skal haldast komandi vár; høvu›sendamáli› er at fáa eina semju um – ella ein meiriluta fyri at fullføra eina ætlan, sum arbeitt ver›ur vi› í løtuni – hatta burdi tú kunna tiki› vi› í greinina, men hálvir sannleikar og brot hava altí› ligi› Sjálvst‡risflokkinum nær, og ikki at tosa›, tann so ey›kenda »pingpong« politikkin hjá Sjálvst‡risflokkinum.

Fyri ta› tri›ja so hevur varaløgma›ur ikki proklamera› naka› sum helst, hann kom vi› einum dømi, men kanska er hetta funnin fressur hjá einum ungum politikara at rista áræ›i av sær og leypa í sambandsleirin, men hvat hevur tú so gjørt á Føroya løgtingi hesa tingsetuna?

Fyri ta› fjór›a, so er fullveldisætlanin hjá sitandi samgongu als ikki koyrd á bláman, hugsa› um alt ta› kunnandi tilfari› sum er komi› frá hondini, ta› situr ein grundlógarnevnd og arbei›ir vi› at smí›a eina grundlóg fyri Føroyar… á bláman? Hvítabók – ta› valaverk, stendur eftir sum ein t‡›andi partur av kanningum gjørdar í sambandi vi› fullveldisætlanina – á bláman? Jákup Sverri Kass – tú kanst ikki siga ta› at samgongan sparir upp til eitt fullveldi, tú kanst heldur ikki siga at fólki› í Føroyum blø›ir, um tú veruliga meinar at ta› stendur so illa til í Føroyum – so gloymir tú skjótt; tí eitt er púra greitt, ta› er eingin kunstur at brúka eina rúgvu av pengum »í einari handavending«, fyri at n‡ta ta› tugda or›i› hjá tær, men heldur hvussu tú skilabest uppbyggir eitt samfelag, og tá tú so kemur vi› »Eidesgaardsvaduni«, um at eingin veruligur politikkur ver›ur førdur vegna fullveldisætlanina, so haldi eg veruliga at tú undirmetir samgonguna alla sum hon er – eisini tín floksfelaga, tí tú burdi vit at henda samgonga hevur lagt lunnar undir eina komandi oljuvinna, henda samgongan hevur lag tunnar undir eina n‡ggja kommunuskipan, henda samgongan hevur lagt lunnar undir eina n‡ggja pensjónsskipan (sum tó ikki er heilt li›ug enn) og solei›is kundi eg hildi› fram, alt hetta umframt fullveldismáli›… so Jákup Sverri Kass, eg haldi at tú skuldi tiki› og endursko›a hetta valskei›i›, og sí›an skriva› hvat MEIR tú kundi hugsa› tær.

Vit eru fleiri, sum halda at heimast‡rislógin skuldi veri› avtikin, fyrst av øllum og sí›an ein avtala millum Danmark og Føroyar sett í gildi, sum greitt ásettti ymiskt – sum hev›i vi› ríkisrættarligu stø›u Føroya at gera.

Tú veist eins væl og øll onnur at ein skipan vi› skattalætta er á veg, og henda skal samskipast í landsst‡rinum, hví tú letst so óvitandi – ella um tú veruliga er óvitandi um hvat fer fram í samgonguni, skal eg ikki gera meg klókan uppá.

Men eitt er so greitt, og ta› er at tú hevur havt ta› naka› ringt hesi árini landsst‡ri› hevur arbeitt vi› fullveldismálinum, nú tú avdúkar at tú als ikki er ein fullveldissinna›ur føroyingur – ta› skuldi so fingi› onkrar klokkar at ringt hjá »sjálvst‡ris-veljarum…«.

Eg skal rá›a tær til at halda teg til veruleikan og seta teg inn í tingini hvat samgongan arbei›ir vi›, tí hev›i tú gjørt tær tann ómak, n‡ttist tær ikki at koma vi› hasari fjákuti greinini í Dimmalætting fríggjadagin 24.11.2000.

Eg síggi fyri mær at samgongan – tá valskei›i› er runni›, hevur sett skjøtil á eina n‡ggja tí› í Føroyum, har grei›ar avtalur um blokkin, yvirtøkur og framtí›arvi›urskifti vi› Danmark standa sólkarklárar fyri øllum føroyingum. Eg ímyndi mær eisini eitt samfelag har øll tey tungu samfelagsmálini sum henda samgongan hevur arbeitt vi› eru avgreitt.

Um vit so kunnu gle›a okkum til eina frælsar Føroyar innan eina rímuliga tí›, ger stø›una als ikki verri, hr. Jákup Sverri Kass.

Fyrigivin og flongdur

Andras Mi›skar›
Klaksvík



Landsst‡risma›urin Torbjørn Jacobsen hevur sagt alment, at løgma›ur er landasvíkjari vi› fleiri líkum í lastini. Hetta mugu sigast at vera stór or› at brúka um ein løgmann.

Men eftir at løgma›ur hevur fyrigivi› Torbirni, og Høgni Hoydal hevur flongt hann (onkunsta›ni ímillum eitt reytt- og eitt gult kort), so standa tveir ósvara›ir spurningar eftir:

1. Hvat meinar Torbjørn Jacobsen nú um løgmann?

2. Hvussu ver›ur vi› frídøgunum 1. mai og 5. juni? Torbjørn Jacobsen handlar, sum um hann longu hevur fingi› loysing. Fyri honum er 5. juni ikki grundlógardagur. Men Starvsmannafelagi› og helst onnur fakfeløg vi›, hava samrátt seg til ein hálvan frídag tann 5. juni.

Hvat skulu føroyingar nú gera tann 1. mai og 5. juni komandi?

Vit síggjast

»Vit síggjast« er átak, sum ver›ur gjørt fyri at fáa fólk at n‡ta endurskin. Endurskin eru gjørd til allar næmingar í 1.,2., 3. og 4. flokki í fólkaskúlanum - av tí slagnum, sum kunnu ver›a fest um bein ella arm vi› kar›alási.

Føroya Sparikassi og Føroya Lívstrygging rinda framlei›sluna av endurskinunum, me›an Fer›slutrygd stendur fyri at fáa endurskinini út til skúlarnar og annars at kunna um tey. Endurskinini ver›a send skúlunum næstu dagarnar, sigur Jón Kragesteen, lei›ari á Fer›slutrygd.

Tí›indaskriv frá Havnarkórinum

250-ára hátí›arhald av Johann Sebastian Bach í Gøtu og Havn

Hátí›arhaldi› av 250-ára degi Johann Sebastian Bach hevur givi› afturljó› um allan tann klassiska tónleikaheimin í ár, og nú ári› er fari› at halla hava føroyingar eisini møguleika at ver›a vi› til at hátí›arhalda hetta mæta tónaskaldi›.

Um vikuskifti› skipar Havnarkóri› fyri tveimum stórfingnum konsertum. Umlei› 45 sangarar, 25 tónleikarar og 4 solistar úr Føroyum, Íslandi og Danmark trína pallin og framføra Jólaoratoriumi› av Bach. Upprunaliga skriva›i Bach verki› solei›is, at hvør av teim íalt 6 pørtunum hoyir til og eigur at framførast til ein ávísan dag i jólaføstuni. Í dag er meira vanligt, at ávisir partar ver›a framførdir á somu konsert. Solei›is eisini vi› konsertunum um vikuskifti› har partur I-III og brot úr parti› IV og V ver›a framførdir.

Ta› er íslendski kórlei›arin og føroyavinurin Jón Stefánsson, sum fer at stjórna framførslunum. Solistarnir eru Berghild Poulsen, sopran, Elsa Súsanna Dalsgaard, alt, fiorbjörn Rúnarsson, tenor, Bergflór Pálsson, bass.

Fyrra konsertin ver›ur leygardagin 2. desember kl. 17:00 í Gøtu Kirkju og seinna konsertin ver›ur í Nor›urlandahúsinum sunnudagin 3. desember kl. 16:00.

Atgongumerkir til seinnu konsertina eru at fáa í Nor›urlandahúsinum og í Kunningarstovuni.

Tí›indaskriv frá Kunningarstovuni

Jólatræi› í Havn

Jólatræi› ver›ur tendra› í dag, 2. desember, kl. 15.30 á Vaglinum. Havnar Hornorkestur spælir. Bergur Debes Joensen, prestur, og Leivur Hansen, b‡rá›sforma›ur, tala.

Kl. 16.00, eftir at jólatræi› er tendra›, syngur barnakóri› hjá Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla á Glade Hjørn.

Jólatrøini á Argjum, Hvítanesi, í Kaldbak og Nor›radali ver›a tendra› næsta vikuskifti.

Tí›indaskriv

Skipalistin 2001


SKIPALISTIN 2001

við FØROYSKUM ÁLMANAKKA, STREYMTALVU OG STREYMKORTUM

Ein góður felagi...

STATOIL

Nú er Skipalistin aftur at fáa um alt landi›. Bókin er í høvu›sheitum snikka› eftir sama leisti sum í fjør, men er tilfari› ví›ka› í ár. Uppl‡singarnar og litmyndirnar av føroyska flotanum eru helst mest sermerkti parturin í bókini, men nógv anna› vi›komandi og áhugavert er eisini at finna í bókini.

Skipalistin er fyrst og fremst bókin, sum vendir sær til øll tey, i› hava áhuga fyri skipum og sjógvi, og tí, sum har til hoyrir. Í ár eru litmyndir og uppl‡singar um øll tey 272 skipini størri enn 15 Bruttotons. Eisini eru uppl‡singar um teir 47 bátarnar, i› eru størri enn 4 nettotons.

Eins og seinast eru allar myndirnar í litum. Stórur dentur hevur veri› lagdur á, at myndatilfari› skal vera so n‡tt og gott sum yvirhøvur til ber, og tí er stórur partur av myndatilfarinum n‡ggjur í ár. Fleiri myndir eru fingnar til vega frá skipaeigarum og lokalum myndatakarum.

Er eisini álmanakki

Skipalistin kann sigast at vera fleiri bøkur í einari. Løgtingslóg um kravda bjargingarútger› ásetir, at føroyskur álmanakki skal vera umbor› á øllum bátum undir 20 bruttotons. Hetta krav l‡kur Skipalistin til fulnar, og er bókin tí eisini ein hentur felagi at hava vi›, tá fari› ver›ur á flot.

Hetta setur sjálvsagt krøv til bókina. Dentur hevur tí veri› lagdur á, at vi›komandi myndugleikar fáa innihaldi› til gó›kenningar á›renn ta› fer til prentingar. Innihaldi› er dagført í samrá› vi› m. a. Skráseting Føroya, Fiskirannsóknarstovuna, Landsverkfrø›ingin, Radioeftirliti›, Fiskivei›ueftirliti› og Náttúruvísundadeildina.

Sló›brótandi tilfar um streymvi›urskifti

Sum naka› heilt n‡tt hev›i Skipalistin í fjør álmanakka, streymkort, streymtalvur og vestfallskyrrindi samla› í einari bók. Hetta sama er galdandi fyri Skipalistin 2001, og aftur í ár er ta› Petur Hans Dahl, varastjóri á Føroya Sjómansskúla, sum hevur gjørt talvuna um vestfallskyrrindi í Su›uroyarfir›i.

Umframt tilfari› um streym, sum er rokna› eftir vanliga háttinum, hevur Skipalistin 2001 uppl‡singar um streymvi›urskifti, sum eru grunda›i á veruligar mátingar á Munkagrunninum. Hetta er fyrstu fer›, at hetta er roynt, og vónandi fer hetta at geva okkum neyvari og meiri álítandi uppl‡singar um streymvi›urskiftini kring oyggjarnar.

Tilfari› og uppl‡singarnar um streym eru tí væl fleiri enn ta›, i› menn eru vanir vi›, og spennandi ver›ur at vita hvussu hetta fer at roynast millum manna. Ta› er serfrø›ingurin Knud Simonsen á Náttúruvísundadeildini, sum hevur gjørt henda partin.

Havnir í Føroyum

Sum naka› n‡tt eru myndir og uppl‡singar um føroysku havnirnar tiknar vi›. Her ber til at síggja, um eitt nú møguleikar eru fyri at leggja trygt at landi.

Av ø›rum tilfari kann nevnast vi›komandi lógartilfar, tilfar um radiosamskifti, trygdar- og bjargingrvi›urskifti, hagtøl fyri skip og fiskivinnu.

Eisini føroyskir útbúgvingarstovnar, sum hava tilkn‡ti til sjógvin, eru vi›. Her eru m.a. uppl‡singar um upptøkutreytir, skúlaskipanina og ví›ari útbúgvingarmøguleikar.

Í Skipalistin er eisini hentur listi vi› nøvnum á fiski, hvali og kópi á ymiskum tungumálum. Hesin parturin er í ár ví›ka›ur vi› sjófuglum. Nøvnini eru á føroyskum, donskum, norskum, íslandskum, enskum, t‡skum og á latíni.

Ta› er einki at ivast í, at Skipalistin 2001 er ein gó› og vi›komandi bók, sum er hent at hava hjá øllum, i› á einhvønn hátt hava áhuga fyri skipum og sjógvi.

Skipalistin 2001 er 385 bla›sí›ur, og fæst til keyps í bókabú›unum. Eisini ber til at keypa bókina á Statoilstø›um og posthúsunum um alt landi›. Skipalistin 2001 kostar kr. 175,- í bleytari permu og kr. 240,- innbundin.

ÚTRÓÐRAMENN!

Nýggjar SNELLUR !

Vaki-DNG hevur frá tí vit byrjaðu, fyri 15 árum síðan, arbeitt við at framleiða snellur. Í hesum tíðarskeiðinum hava vit selt meira enn 5500 snellur til viðskiftafólk okkara um allan heim.

Skift tær gomlu snellurnar út við NÝGGJAR!

Til at ganga ynskjum teirra á møti, ið hava gamlar snellur og vilja ognast nýggjar snellur, av slagnum C6000, sum eru teldustyrdar, hava vit nú eitt tilboð. Vit móttaka øll sløg av snellum fyri ávíst gjald, tá nýggjar verða keyptar. Hetta tilboð er galdandi til 05.01.2001. Eisini hava vit fleiri sløg av línuspølum og aðrari útgerð innan línuveiðu, garnaveiðu & trolaraveiðu.

Fa. JÓANNES F. DAHL
Maskinsmiður - Umboð fyri Vaki-DNG
FO-460 Norðskála • Tel. 422274 • Fax 422189
GSM 221000 • E-Mail: dam-dahl@post.olivant.fo

VAKI DNG

Vaki-DNG tel. 00 354 5953000 • Fax 00 354 5953001 • GSM 00 354 8620855
E-mail: bhb@vaki.is

Sosialurin - 311820